


**Faktorin:**

# Havnarmaður setti gongd á Klaksvíkina

**Í gamla kirkjugarði Havn er ein rekkja við fimm eins gravsteinum. Her liggur Faktorin í Klaksvík Johan Christian Djurhuus, kona hansara Anna Elisabeth, sonurin Johannes, dóttirin Magdalena og abbasonurin Egil Henning. Hesi umboða ein stóran part av søguni hjá Klaksvík. Hetta er samstundis ein søga um vinnuligan dugnaskap og persónliga óeydnu. Tískil kemur hesin parturin og teir komandi tríggir partarnir at snúgva seg um hesa søgu**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**100. partur**

Hetta er partur nummar 100 í hesi røðini ”Hendur ið Sleptu.” Hetta merkir, at røðin hevur umrøtt nógv fleiri enn 100 gravir og enn fleiri fólk, sum eru jarðað í teimum.

Tað hevur víst seg, at røðin er sera væl umtókt millum fólk. Hon er viðkomandi fyri nógv, sum so ella so hava samband við tey fólk, sum skrivað er um.

Her er talan um søguna um **fólkið** í Havn. Men nógv teirra hava bæði røtur og eftirkomarar kring landið og eisini uttanfyri landoddarnar.

Her er fólk úr øllum stættum, um tað kann sigast so. Her eru arbeiðskonur, fiskimenn, skiparar og lærarar fyri at taka dømi.

Framvegis er nógv tilfar eftir. Nú er setningurin settur at hava 150 greinir, og tað er eisini tilfar til hetta. Hvat so verður, fer tíðin at vísa.

Í flestu førum eru søgurnar um fólkini, sum eru jarðað undir gravsteininum hjá viðkomandi. Men tá ið tað til dømis eru børn, kann søgan vera um teirra foreldur. Í øðrum førum teirra ektafelaga ella eftirkomarar

Ein slík røð hevði ikki latið seg gjørt um ikki fólk vóru so beinasom at lata tilfar, sum tey eiga. Beinasemið hevur verið uttan avmarkingar. Tað skulu allar keldurnar hava tøkk fyri.

Tað eru eisini nógv sum spyrja, um ætlanin ikki er at geva hetta út í bók. Tað kundi kanska verið eitt gott hugskot.

**Jomfru Djurhuus**

Ein kelda til fleiri av frásagnunum er ævisøgan hjá Caroline Heinesen, mammu William.

Ein av hennara frásøgnum er henda, sum er um systir Faktorin:

Der var iblandt mine forældres bekendte en ældre dame, som var faster til apotekeren af samme navn. Hun kom altid hjem til os og spiste ofte til aften hos os. Hun var lille og fyldig med kuglerundt ansigt, livlig og holdt meget af at høre nyt. Hun boede på Kirkevej, hvor nu Poul Johannesen (arbeiddi á Apotekinum) bor, men det var dengang et lille lavt hus.

Hun bad altid om aflæggere, men som oftest tog hun dem. Hun havde aldrig tid til at vente til de fæstede rod og rykkede dem op hver dag. Man så ofte hendes hænder i vinduet i færd med at prøve, om planterne stod faste.

Engang havde hun i et selskab puttet en mængde aflæggere i lommen, og det havde hendes nevø set. Han bad hende så om at låne hendes lommetørklæde. Hun havde jo glemt, hvad hun havde i lommerne og sammen med lommetørklædet faldt så alle aflæggerne ud, og der blev stor munterhed. Men hun undskyldte sig med, at de voksede bedre, når man stjal dem. Hun havde fødselsdag sammen med mig, d. 6. januar, så mor blev altid bedt dagen efter, og så var jeg med. Vi fik altid opvarmet chokolade, men kaffen ville mor ikke så gerne drikke, da jomfru Djurhuus lavede kaffeposen af sine strømpefødder og vaskede dem så dårligt. Engang til hendes fødselsdag kom apotekeren (bróðursonurin Johannes) forbi og hendes vindue stod åbent, så tog han en af hendes fineste urtepotter og gik den anden vej og forærede hende den. ”Åh,” sagde hun, ”det er akkurat mage til en, jeg har i vinduet," og skulle vise ham den, men så opdagede hun det. Men hun var så godmodig og var aldrig vred på sine tre unge brodersønner. Apotekeren var den ældste af de tre, så kom Andreas og så doctor Djurhuus i Klaksvig, de var så ovenud livlige. Hun kaldte dem Johs, Dres og Luff. Engang skulle hun til Klaksvig og besøge sin broder (Faktorin) og bad så nogen om at tage imod hendes nøgler og tage vare på huset, mens hun var borte. Så snart hun var taget afsted, åbnede de huset for et ungt selskab, og så holdt de bal og tog hendes tøj og pyntede sig med. Det blev en munter aften, men alt var i orden, inden hun kom hjem, så hun fik intet at vide.

Hun døde meget pludselig. Da folk kom ind en morgen, lå hun død på gulvet.



*F.v.*
*JOHANNES OLAUS VANG DJURHUUS*
*F. 7. JULI 1886*
*D. 20. OKTOBER 1933*
*---*
*MAGDALENE CHRISTINE DJURHUUS*
*F. 13. MARTS 1859*
*D. 8. SEPTEMBER 1925*
*---*
*EGIL HENNING DJURHUUS*
*F. 5. MAJ 1898*
*D. 14. FEBRUAR 1919*
*--*
*JOHAN CHRISTIAN DJURHUUS*
*F. 10. APRIL 1834*
*D. 17. JUNI 1918*
*--*
*ANNA ELISABETH KJÆLNES*
*F. 31. DECEMBER 1830*
*1. JUNI 1911*



*Anna Elisabeth Djurhuus*



*Johan Christian Djurhuus*

Sum ikki eina ferð hevur Viggo Christiansen funnið fram til, at ”jomfrúin” var Julianna Cathrina Djurhuus. Hon var født 6.1. 1821, doypt 19.1. sama ár og varð konfirmerað 16.4.1835 í Havnar kirkju. Mamman kallaðist Malena Michalsdatter og pápin Johannes Vang Olavius Djurhuus. Julianna búði hjá foreldrunum fram til 1850. Hon var hjá mammuni fram til 1860. Síðan hevur hon verið einsamøll. Hon doyði 11. desember 1892, og varð jarðað í gamla kirkjugarði tríggjar dagar seinni.

**Faktorin**

Henda frásøgnin er so um beiggja hennara Faktorin. Keldan til hana er J. Símun Hansen í ”Havið og Vit.”

Millum teir fríhandilsmenn, sum stigu fram beint eftir, at monopolhandilin var avtikin er J.C. Djurhuus, vanliga kallaður Faktorin, tann best kendi í Norðoyggjum og millum teir mætastu í Føroyum. Í dag hevði hann væl verið kallaður stjóri.

Hann var føddur 18. apríl 1834 og varð doyptur í Havnar kirkju 19. mai.

Faktorin var bóndasonur á Húsagarði í Havn, kom ungur á embætisskrivstovurnar har, fór síðan til Danmarkar og fekk pláss á eini handilsskrivstovu í Ribe. Um hetta mundi var aftur talan um at avtaka monopolhandilin í Føroyum, og hesin ungi maðurin hevði ætlað sær at nýta handilskunnleika sín í handilins tænastu. Tað fekk hann eisini høvi til. Tann gamli faktorin í Klaksvíkini, Johan Mortensen, hevði sagt upp, og Jørgen Bech, sum nýliga hevði keypt henda handil sóknaðist eftir einum manni, sum kundi



*Jomfru Djurhuus teknað av William Heinesen*

skipa fyri handlinum. Sjálvur búði Jørgen Bech í Keypmannahavn. J. C. Djurhuus fekk starvið og tekur við tann 1. juli 1858.

**Skuldi skapa nýggjar vinnumøguleikar**

Tað var ein í allar mátar væl útborin og búgvin 24 ára gamal maður, sum nú sat á tí gomlu einahandilsborgini og skuldi praktisera teir nýggju fríhandilstankar í Føroyum. Hann var væl lærdur, átti eitt náttúrligt blídni og vinsemi, sum gjørdi sítt til, at hann skjótt kom at vera væl umtóktur av teimum mongu norðingum og eystringum við, sum eisini av gomlum vana leitaði aftur til sama handil, sum teir vóru vanir at fara til.

Men fríhandilsins fyrsta og størsta uppgáva var at skapa nýggjar vinnumøguleikar, og her var tað havsins ríkidømi, sum skuldi troytast. Nýggj veiðuamboð skuldu útvegast, so støði kundi leggjast undir tann komandi peningabúskap, ið skuldi avloysa ta aldargomlu bóndatíðina og naturalbúskapin. Árabáturin hoyrdi heima í hesi tíðini, men tann nýggja kravdi onnur før.

Longu í 1864 byrjar Faktorin skipsfiskiskap við einum skipi, eini sokallaðari jakt, sum handilin hevði at sigla ímillum við. Árið eftir er tað, at Norderø Fiskeriselskab verður stovnað, og her er Faktorin ein høvuðsmaðurin og sat í felagsins stjórn alla tíðina. Skipið var Caprice, sum endar í Onglandi nøkur ár seinni.

Faktorin fær sær annað skip, eina skonnart, og nú byrjar skipsfiskiskapurin av álvara í Norðoyggjum. Trý ár seinni keypir hann saman við handilsfelaga sínum Clæmint Høgnesen í Oyndarfirði, luggaran Bikuben, og í 1874 hevur hann trý skip á saltfiskaveiðu. Faktor Djurhuus, sum væl kann kallast faðir skipsfiskiskapsins í Norðoyggjum, kundi eisini gleða seg um eitt gott úrslit av hesum nýggja veiðuhátti, í hvussu er tey fyrstu árini.

Fyrst i 80-unum komu so óhappini, prísfall, skipamissir og annað hvørt í hølinum á øðrum, og skipsfiskiskapurin dettur nú niðurfyri í nøkur ár. Tollurin, sum í Spania varð lagdur á klippfisk, gjørdi hesa vinnu ólønandi í eina tíð. Faktorin var ein av teimum, ið gjøgnum tingið royndi at fáa henda meinboga av vegnum.

Men hann settist ikki hendur í favn. Hann tekur upp heilt nýggjan søluhátt, nevniliga ísfiskasølu til Onglands og Danmarkar, sum júst í hesum tíðum tekur seg upp av álvara. Aftur gjørdist árabáturin stuðulin undir útflutninginum, men sølan kom ikki at vera tann, sum menn høvdu roknað við. Hon helt tó á í mong ár, so ísfiskasølan í Klaksvík kann førast aftur til 1884.

**Bygdi íshús og agngoymslu**

Tað var eisini Faktorin, sum lat byggja fyrsta íshús og agngoymslu í Klaksvík og harvið loysir agnspurningin. Lýsismeltarí kemur í 1870 og havkallaveiða verður rikin í nøkur ár.

Tíðarskeiðið 1885-95 var ein merkiliga deyð tíð vinnuliga sæð. Síðst í 90-unum hoyra vit aftur nýtt frá Faktorinum. Hann ger nú royndir við snurriváð og maskindrivnum línubáti, men hvørki eydnast. Um aldarskiftið gjørdist hann partaeigari í sluppini Viðoy. Men tað var hann sjálvur og ikki handilin, og tá motorbátarnir komu, letur hann tann fyrsta byggja í 1905. Tað var "Poul Nolsøe Biskopstøð”.

Tað kann tykjast løgið, at Faktorin, sum í sínum yngru árum var so hugaður fyri at fáa skipsfiskiskapin í gongd, nú tá henda veiða fer at vinda uppá seg, mest sum smokkar burtur úr, og onga slupp keypir í tíðarskeiðnum 1882-1908, sum annars er eyðkent av eini stórari øking í skipatalinum – eini 80 skip. Ein bítur tó merki í, at meðan Faktorin sjálvur keypir part í skipi, heldur handilin seg uttanfyri. Tað kundi bent á, at eigaramenninir ikki vóru hugaðir fyri skipsveiðuni, men tað kunnu væl vera aðrar grundir.

**Byrjar sparikassavirksemi**

Um handilsins vøkstur hesu árini skal bert verða sagt, at í 1859 var umsetningurin 159 tús kr, og í 1875 var hann 575 tús. Tá Faktorin kom, var bert ein útihandil. Í 1890 vóru teir einir 15 í tali. Sum fyristøðumaður fyri øllum hesum handlum, frá Norðdepil til Eiðis, úr Havn og út á Strendur, kom Faktorin at vera tann maður, ið meira enn nakar annar hevur leitt tað búskaparliga lívið í Norðoyggjum og Eysturoy hesi 50 árini.

Vit teirri fíggjarligu framgongdini, sum stóðst av fiskivinnuni, teim góðu fiskiárunum og tí økta arbeiði á landi, kyknaði upp spurningurin um nýtslu av avlopspeninginum. Í 1876 fer Faktorin at taka ímóti peningi, sum innsettur verður á konto, og sum renta verður latin av, eitt slag av sparikassavirksemi, sum í fyrstu syftu gav handlinum fyrimunir, men sum eisini virkaði sum eitt haft á inflatiónini í hesi peningaríku tíðini.

**Fekk lækna og kirkju til Klaksvíkar**

Og fara vit til endans út um handilsdyrnar, síggjast spor eftir Faktorin alla staðni í teim kirkjuligu, sosialu og mentunarligu framtøkum, sum gjørd verða í hansara tíð, og tað ikki bert sum ein áhugaður íspinnari, men sum hin áhaldin gávumildi maðurin, ið stundum sjálvur, stundum saman við Jørgen Bech ella eftirmonnum hansara, leggur peningaliga støðið undir læknahúsini, ið gjørdi tað møguligt at fáa lækna til Norðoyar so tíðliga sum í 1872, og skúlan við lærarahúsum og bókasavni fýra ár seinni.

Eisini kirkjuni, sum bygd varð í 1866, var Fakturin áhugaður fyri og skal hann hava æruna fyri, at hon var gjørd so høg og stór, at hon hóast fólkatalið var 12-faldað, kortini var nóg stór eini 60 ár seinni.

Hann var ein av høvuðsmonnunum fyri at fáa bygt tað fyrsta sjúkrahúsið í 1896. Tá háskúlin var gjørdur í Føgrulíð, svimjihylur úti í Grøv og mangt annað heittu menn ikki til ónyttu á hin aldrandi handilshøvdingin úti í Klaksvíkini, Norðoya mest kenda og best umtókta mann í 50 ár.

**Blíðskapur so tað munaði**

Sum vera man hevði Faktorin nógv almenn størv um hendur. Til dømis kann nevnast, at hann í nógv ár sat í kommununi og á løgtingi frá 1885-96. Tann kunnleiki, hann hevði vunnið sær í embætisskrivstovunum í Havn kom honum til góðar seinni og gjørdi, at ofta varð heitt á hann, tá skrivast skuldi. Álitismaður var og hartil vinsælur. Gestablídni hansara – og konu hansara við – var tiltikið víða um tá á døgum og nógv ár seinni. Tvær ferðir um árið, føðingardag sín 10 apríl og hjá konuni, nýggjarsaftan, høvdu tey opið hús. Har kom at kalla øll bygdin saman, bæði høgur og lágur.

Har heima høvdu hann og konan Anna Elisabeth ikki bert havt góðar dagar. Nógv børn mistu tey á ungum aldri. Anna Elisabeth var dóttir Onnu Thomasdóttir og Jacob Thomassen Kjelnæs. Tey eiga ongar eftirkomarar “innangarðs”. Tó segðist ein sonur at hava átt eitt barn, haðani tað er ætt.

Tað var ein gamal hart royndur maður, sum legði frá sær í 1908 aftaná at hava stýrt handlinum í 50 ár. Tá flutti hann aftur til Havnar til sonin Jóhannes Djurhuus, apotekara, har hann doyr 17. juni 1918, 84 ára gamal.



*Handilin í Klaksvík um 1856. Húsini t.v. vóru bygd 1847 og fingu navnið Nýggja Pakkhús (14x9 m). Hini eldru vóru so kallað Gamla Pakkhús. Áføst í teimum er Bøkjarahúsið (9,5x8m). Teknað hevur Óli Petersen*



*Tað vóru Jørgen Bech og Sønner, sum Johan Christian Djurhuus leiddi fyritøkuna fyri. Ein av synunum var Peter Bech, sum tók yvir eftir pápan*



*Handilin hjá Jørgen Bech & Sønner við bryggju*



*Handilin við starvsfólki í seinnu árum*



*Faktorin var ein av oddamonnunum við skipsfiskiskapi. Ein roynd varð í 1869 gjørd við Gylfe*

**Næstu ferð**

**Komandi partur verður um son Faktorin, tann væl umtókta doktor Sofus, sum doyði so óeydnisliga**